e-mail: jakup@sosialurin.fo

# Ítróttur

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

# Einaferð verður tað

*Magni Jarnskor er sannførdur um, at tað fyrr ella seinni fer at eydnast einum føroyskum liði at spæla seg til annað umfar í europeiskum høpi*




*Hóast uppgávan kann tykjast møtumikil, so rykist liðskiparin hjá GÍ at vera sannførdur um, at hann og hansara menn fara at standa seg væl, tá teir í kvøld fara inn á Tórsvøll*

Jákup Mørk

Týskvøldið vóru gøtumenn á Tórsvølli, har seinastu fyrireikingar til frammanfyristandandi uppgávuna vórðu fingnar frá hondini.

**Ikki serliga svenskt**

Setningurin hjá gøtumonnum er hesu ferð svenskur, og einki er at taka seg aftur í, at GÍ hevur góðar royndir í so máta.

Í 1996 høvdu gøtumenn nevnliga eisini svenska mótstøðu, ta ferðina úr Trelleborg. Úrslitið gjørdist tá tvey tepur tap, soleiðis at samlaða tapið gjørdist 2-4. Tað, sum tó serliga varð lagt til merkis ta ferðina, vóru tey úrslit, sum Trelleborg fekk seinni í kappingini. Tað eydnaðist teimum nevnliga at koppa ensku meistarunum úr Blackburn, áðrenn teir í triðja umfari máttu lúta fyri italska Lazio, har talan enntá varð um eitt sera tepurt tap.

Venjarin hjá GÍ, Johan Nielsen, tykist tó ikki at hava hug at samanbera Norrkøping, sum nú er mótstøðuliðið, við Trelleborg:

- Talan er um eitt sera gott lið, sum spælir rættuliga atypiskan svenskan fótbólt, sigur Johan. fyri at kunna seg um mótstøðuna hevur hann júst verið í Svøríki, og tá hann sigur, at liðið spælir atypiskan svenskan fótbólt, sipar hann til, at talan ikki eru um lið, sum spælir vanliga svenska fótbóltin við nógvum longum sendingum.

Eisini hevði hann bitið merki í, at sviarnir tykjast vera sera væl fyri kropsliga, so alt í alt er hetta helst ein ivaleysa stórur biti hjá gøtumonnum.

**Ikki bangnir**

Hesir upplýsingar loypa tó á ongan hátt hvøkk á gøtumenninar. Royndirnar, sum teir við tíðina hava fingið, eru í so máta ein sera góð barlast, og hesum dylur liðskipari teirra, Magni Jarnskor, heldur ikki fyri:

- Sum so hava vit ikki gjørt nakað serligt í fyrireikingunum til dystin. Vit hava, eins og vanligt verið í Danmark á venjingarlegu, og so hava vit annars sett okkum fyri, at fáa sum mest burturúr, heldur Magni fyri.

Av orðalag hansara skilst eisini, at tann fjáltur, sum ofta er sermerktur undan eini stórari uppgávu, so at siga ikki er til staðar hjá gøtumonnum. Hetta er 13. altjóða dystur felagsins, og umframt hetta, hava fleiri av leikarunum eisini royndir frá landsliðsfótbólti, so alt í alt munnu teir vera fullgreiðir um, hvat krevst fyri at loysa slíkar uppgávur.

Um hópin sigur Magni annars, at so at siga allir mans eru tøkir til dystin. Óli Hansen og Henning Jarnskor vandu ikki týskvøldið, tí teir høvdu onkran smávegis skaða at dragast við, men roknað verður kortini við, at teir verða á vøllinum týskvøldið.

**Kortini spentir**

At eingin fjáltur er á leikarunum merkir tó á ongan hátt, at teir ikki eru uppsettir til dystin:

- Fyrstu løtuna ræður um at halda verjuna tætta, og síðani mugu vit so royna at arbeiða okkum fram eftir vøllinum, soleiðis at talan kann gerast um málmøguleikar seinni í dystinum, heldur liðskiparin. Hann heldur, at verða fortreytir uppfyltar, skuldi góður møguleiki verið fyri einum líkina úrsliti.

Tá tosið fellur inn á hugtakið »gott úrslit«, er sjálvsagt nærliggjandi at spyrja, nær ella um Magni Jarnskor heldur, at eitt føroyskt lið megnar at leika seg víðari í europeiskum høpi:

- Fyrr ella seinna fer tað at eydnast. Feløgini venja meir og meir, og hetta hevur so avgjørt verið við til at hækka støðið í fótbóltinum, heldur hann fyri. Harumframt heldur hann eisini, at tað so avgjørt er eggjandi og mennandi hjá leikarunum, at fleiri ungir mans nú fáa møguleika at venja við feløgum uttanlands.

Júst nær vit fáa eitt føroyskt lið við í pottin til annað umfar, veit hann tó ikki, men hann vísur kortini á, at møguleikin sjálvandi altíð er til staðar, so tað er bert ein spurningurin um tíð, áðrenn hetta hendir.

Um tíðin til hetta nú er komin hjá gøtumonnum, ella um teir mugu bíða í minsta lagi eitt ár, fæst so at vita í kvøld á Tórsvølli.

# Út at telva

*Føroyskir telvarar gera alsamt meira vart við seg uttanlands*

Carl Eli N. Samuelsen & Eyðun Nolsøe

Talv: Alt fleiri føroyingar royna seg við at telva uttanlanda at fáa íblástur, ið ikki er møguligur her heima. Hetta kemst av, at ov fáar kappingar verða fyriskipaðar í Føroyum. Vanligt kappingarár verður bert telvað í einstaklingakappingini á páskum, Íslandssúlukappingini um summarið og liðkappingini um veturin. Einstakar aðrar kappingar hava tó verið uppi, men eru dottnar niður fyri aftur.

Nú sær ljósari út hóast alt. Hin sera sterka Tórshavn Open stendur fyri durum í oktober og fer at geva okkara telvarum neyðugar avbjóðingar. Luttakaralistin er sannførandi og eitt herðaklapp til fyrireikarnar.

**Flóvin slóða fyri**

Sum slóðbrótandi einstaklingur, hevur Flóvin Tór Næs tað mesta av einum ári ferðast runt í Evropu og roynt sínar dygdir á talvborðinum. Hendan rundferð hevur brotið niður mentalar garðar hjá øðrum føroyskum telvarum, sum kunnu síggja nýggjar møguleikar lata seg upp. Úrslitini hjá Flóvini hava verið svingandi, meðan innsatsurin sanniliga ikki hevur ligið eftir.

Longu nú hava so aðrir melda seg á talvfrontin úti í stóru verð. Í Politikken Cup í Keypmannahavn vóru fleiri føroysk umboð við, har John Arni Nilssen og Ólavur Simonsen høvdu frægastu úrslitini. Ólavur lá eftir fáum umførum til at fáa ein IM norm, sum eingin føroyingur enn hevur megnað, undantikið John Rødgaard. Hann stríddist manniliga og vann heilar tveir IM'arar, men mótstøðan gjørdist seinni ov sterk.

Í Ungarn og Kekkia komu tvey nøvn afturat listanum, nevnliga Rógvi W. Rasmussen og Martin Poulsen. Hesin seinri unglingin tók øll av bóli í Budapest, og telvaði sera sannførandi. Hann gjørdist nummar tvey í sínum bólki tá samanum kom, og vann seg langt upp eftir altjóða styrkislistanum.

Í august verður enn ein talvferð við føroyskari luttøku úti í Evropa, tá undirritaðu telva við á talvfestivalinum í Presov, Slovakia. Hetta er eisini ein spennandi kapping, sum tó ikki hevði hevði latið seg gjørt uttan sponsoravtalur við Postverk Føroya, Føroya Lívstrygging og Norðoya Sparikassa. Slíkt samstarv millum vinnulív og mentunarlív er fyrimyndarligt, og ein fortreyt fyri framhaldandi menning innan eitt nú føroyskari telving.

Fylgjast kann við kappingini á: www.samteld.fo/talv

Hendan gongdin við vaksandi føroyskari luttøku í altjóða talvhøpi, kann ikki annað enn bera ávøkst sum frálíður, serliga millum yngri telvararnar.

**Íslandssúlan 2000**

Eftir at hava luttikið í kappingum í Ungarn og Kekkia, var føroyameistarin Flóvin Tór Næs kortini ikki talvtroyttur. Í árligu Íslandssúlukappingini sum varð telvd í døgunum 4 - 6. august, var hann við sínum 2270 ratingstigum styrkismettur langt omanfyri tann næsta í røðini.

Átjan telvarar luttóku í hesari vikuskiftiskapping, ið fevndi um fimm umfør. Av hesum átjan telvarum luttóku trýggir útisetar, nevnliga Terji Petersen og Finnbjørn Vang úr Klaksvík, og Jóan Hendrik Andreasen úr Havn.

Undan fimta og síðsta umfari var støðan í oddanum greið; Flóvin skuldi bert megna javnleik ímóti Terja fyri at tryggja sær súluna, og tað varð júst úrslitið teirra millum. Terji leikti væl, men Flóvin leikti væl og sikkurt við svarta fólkinum. Flóvin vann fýra síni fyrstu talv, meðan teir næstu í røðini høvdu bert trý stig undan síðsta umfari. Herluf Hansen hevði eina góða kapping, til dømis vann hann hegnisliga lokaluppgerðina ímóti Jóan H. Andreasen

Føroyameistarin vísti sína veruligu styrki í hesari kapping, og higartil hevur ár 2000 verið eitt sera gott talvár hjá honum her heima á klettunum.

Endaliga støðan:

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Flóvin T. Næs | 4,5 |
| 2. | Herluf Hansen | 4 |
| 3. | C.E.N.Samuelsen | 3,5 |
| | Terji Petersen | 3,5 |
| | J..H. Andreasen | 3,5 |
| 6. | Finnbjørn Vang | 3 |
| 7. | Olaf Berg | 2,5 |
| | Súni Ziska | 2,5 |
| | Karl L. Johannesen | 2,5 |
| | Jón Mikkelsen | 2,5 |
| | Jákup Andreasen | 2,5 |
| 12 | Brandur Jacobsen | 2 |
| | Mortan Thomsen | 2 |
| | Øssur Joensen | 2 |
| | Hans K. Simonsen | 2 |
| 16 | Thomas Rubeksen | 1,5 |
| 17 | Vagn Heldarskarð | 1 |
| 18 | Jákup D. Joensen | 0 |



# Hava vónirnar við

*Hóast B36 hevur eina torføra uppgávu fyri framman, so eru vónirnar um eitt gott úrslit so avgjørt til staðar*



*Sambært liðskiparanum hjá B36, Jens Kristian Hansen, er tað við vónum um eitt gott úrslit, atB36 í kvøl fer á vøllin í Gladsaxe. B36 hevur áður fingið sera góð úrslit á útivølli, og so er spurningurin, um felagið eisini megnar hetta í ár*

Jákup Mørk

Teir í ferðalagnum hjá B36 høvdu ein róligan dag týsdagin. Tá vit týskvøldið frættu frá teimum, høvdu teir nýtt tað mesta av degnum til at spáka eftir gøtunum í Keypmannahavn. Um kvøldið høvdu teir so verið á Brøndby Stadion, har heimaliðið spældi Champions League undankappingardyst móti týska Hamburger SV.

**Kunnu læra av HSV**

Vónandi kunnu teir hjá B36 taka við læru av júst hesum dysti. Her var tað nevnliga soleiðis, at meðan tað vóru teir á heimaliðnum, sum størsta partin áttu trýstið, so eydnaðist tað móti endanum gestunum at skjóta tvey mál. Ein dystargongd, sum havnarmenninir helst einki hava ímóti at gera eina endurtøku av.

Sum nevnt, so høvdu B36 leikararnir frí týsdagin, men í gjár var aftur venjing á skránni. Sum vit skiltu á lagnum, so var talan um tvær lættar venjingar, harav tann um kvøldið skuldi ganga fyri seg á Gladsaxe Stadion. Annars vandu teir eisini eina ferð sunnudagin og tvær ferðir leygardagin, so alt í alt munnu fyrireikingarnar hava verið so góðar, sum til ber.

**Eru væl fyri**

Hava fyrireikingarnar verið góðar, so kann tað sama ikki sigast um tey úrslit, sum B36 hevur fingið í heimligu kappingini seinasu tíðina.

Hóast hetta, so var lagið sera gott undan dystinum, og vónirnar um eitt gott úrslit høvdu teir so avgjørt eisini við sær.

Jens Kristian Hansen, sum er liðskipari á liðnum, sigur seg ikki tora at gita um nakað úrslit, men hinvegin tóktist hann sannførdur um, at talan fór at gerast um eitt gott úrslit. Hann helt, at leikararnir tóktust vera væl fyri, og burtursæð frá Bjarna Prior, sum framvegis er skaddur, vóru allir mans tøkir. Darius Magdisauskas hevur fingið bruna í stórutá og hevur ikki vant, men teir vónaðu tó, at eisini hann var tøkur til dystin.

**Nógv at vísa á**

At teir hjá B36 hava góðar vónir undan dystinum, hongur ivaleyst eisini saman við, at tað hevur eydnast teimum fyrr at fáa góð úrslit á útivølli í europeiskum høpi.

Tá teir á fyrsta sinni luttóku í europeiskum høpi í 1992, var um reppi at teir komu víðari, men teir taptu kortini samanlagt 2-1 fyri Avenir Beggen úr Luxemburg. Eisini í fjør var nær við, at okkurt spurdist burtur úr, men eftir at hava tapt 0-1 í Turkalandi fyri Ankaragücu, taptu teir eisini heimadystin við somu tølum.

Eydnast tað eisini hesu ferð at skapa eitt gott útgangsstøði undan heimadystinum, má hetta metast at vera eitt sera gott úrslit. Til stuttleikar kann nevnast, at serfrøðingarnir hjá donsku Tipstænastuni so avgjørt ikki rokna við, at føroyingarnir kunnu gera nakrar skreytir í dystinum. Einasti møguleiki fyri at spæla upp á dystin er við sonevndum »handicap spæli«, har pengarnir bert fáast aftur 1,45 ferð, um AB vinnur við minst trimum málum.

# Martin Føroyameistari

*Tennis: Martin Nolsøe Simonsen er fyri 5. ferð føroyameistari í Tennis*

Mánakvøldið skuldi avgerandi dysturin í FM í tennis spælast-

Martin N. Simonsen, sum fýra ferðir áður hevur vunnið kappingina, skuldi í finaluni royna seg móti Eyðun Luid, sum fyri fyrstu ferð skuldi royna seg í finaludysti um FM. Í hálvfinalunum sínum, høvdu teir báðir vunnið á ávíkavist Jóhann Krog og Martin Heinesen.

**Royndirnar sigraðu**

Hóast tað eydnaðist Eyðuni at koma á odda 2-0i fyrsta settinum, so megnaði Martin tó rættuliga skjótt at svara aftur.

Tá alt kom til stykkis, hevði tað eydnast Martini at vinna fyrsta settið 6-2, og í ørðum setti hann bara á fram, soleiðis at endaliga støðan gjørdist ein 2-0 sigur við sett úrslitunum, 6-2 6-1.

Um tað vóru væntandi royndirnar hjá Eyðuni, sum høvdu sína ávirkan skal ikki verða gitt um, men í øllum førum vórðu tað í nógvum førum persónlig mistøk, sum avgjørdu dystin, heldur enn vinnandi bóltar frá mótstøðumanninum.

Sum nevnt er hetta fimtu ferð, at Martin N. Simonsen gerst føroyameistari. Seinasta heitið er tó somikið gamalt sum frá 1997, so uttan iva var tað fjálgandi hjá Martini, at hann soleiðis aftur slapp í fremstu røð.

Umframt kappingina hjá teimum vaksnu, varð eisini kappast í bólkinum undir 17.

Her eydnaðist Teiti Albinus at vinna finaludystin á Rógva Højgaard. Teitur vann dystin 6-3 6-2.

# Tí varð tað Tórsvøllur

*Tá GÍ í kvøld fer á Tórsvøll at spæla, er tað fyrstu ferð eitt lið, sum ikki er heimahoyrandi í høvuðsstaðnum, spælir heimadyst á grasinum*

Jákup Mørk

Onkur eru fegin, onnur hava ilskast, meðan tað hjá teimum flestu ikki ger so øgiliga stóran mun. Talan er um valið, sum leiðslan hjá GÍ framdi, tá teir løgdu heimadyst sín á Tórsvøll, heldur enn á Svangaskarði.



*Eisini svensku mótstøðumenninir hjá GÍ vóru á vøllinum týskvøldið*

**Mynd: Álvur Haraldsen**

**Fíggjarligur munur**

Leiðsla felagsins hevur tó umvegis leikskránna boðað áskoðarunum frá, hví dysturin er settur at vera á Tórsvølli.

Sagt verður, at áðrenn nøkur avgerð varð tikin um hetta, buðu teir bæði Tórsvølli og Tofta Leikvølli at vera við, soleiðis at hesi lótu inn hvør sítt tilboð til felagið. Munurin á hesum var somikið stórur, at nevndin als ikki helt seg hava ráð at síggja burtur frá hesum.

Framman undan hesum vórðu leikararnir eisini eftirspurdir, og tá teir søgdu tað vera tað sama, hvar dysturin varð leiktur. Tá ta smb. leikarunum ikki var nakar ítróttarligur munur, og tá fíggjarligu fortreytirnar vóru betri í høvuðsstaðnum, var talan ikki um nakað trupult val.